# HEILSANIR



**Góðu foreldur og verforeldur**
Vit vilja ynskja tykkum hjartaliga tillukku við silvurbrúdleypsdegnum tann 13.01.03. Alt tað besta og vónandi fáa tit ein góðan túr ynskja
**Mariann & Alex**



**Góðu omma og abbi!**
Hjartaliga tillukku við silvurbrúdleypsdegnum 13.01.03. Eg vóni at tit fáa ein supergóðan túr. Alt tað besta ynskja vit øll,
**lítli John**



**Góðu Emy og Ingi**
Hjartaliga tillukku við 11 ára degnum 10. januar ynskja
**mamma og Niclas**



**Góðu mamma og babba**
Hjartaliga tillukku við silvurbrúdleypsdegnum tann 13.01.03. Alt tað besta í framtíðini. Góðan túr!
**Heilsan dóttir tykkara Birita**



**Góða Emy & Ingi**
Hjartaliga tillukku við 11 ára degnum ynskja
**omma og abbi**



**Góði svigarsonur**
Tillukku við piparinum, og vit sum væntaðu at sleppa í brúdleyp. Men tú hevur nokk fingið betong í skógvarnar.
**Heilsan vit á Langasandi**



**Elskaða Andrea**
Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum. Vit ynskja tær ein góðan dag og alt tað besta í framtíðini.
**Heilsan Ingunn, Tórur, omma og abbi**



**Góði Teitur**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum.
**Muss og klemm frá babba og mammu**



**Hey hey!**
Liverpool og TB
Góði Jákup, lukku og gleði á 10 ára føðingardegi.
**Heilsan Martin og gubbon**



**Góði Jákup**
Tillukku á 10 ára føðingardegnum. Jesus pápi signi framtíðina.
**Heilsan omman**



**Góðu mamma og babba**
Vit ynskja tykkum hjartaliga tillukku við silvurbrúdleypsdegnum tann 7. januar.
**Heilsan Hanna, Durita og Sámal**


## Heilsanir

30,- kr.
Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:..............................................................
..............................................................
..............................................................
..............................................................
..............................................................
..............................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ..............................................................
Bústaður: ..............................................................
Bygd/býur: .................................. Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«




# TILTØK

**Meinigheitshúsið**
5.-12. januar er Heimsbønarvika og er bønarløta hvørt kvøld mán.-leyg. kl. 20.00. Sunnudagin er Sunnudagsskúli kl. 14.00 og endar Heimsbønarvikan við møti kl. 18.00.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Símun Hansen.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 20 Ungdómsmøti.
Í morgin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Kvøldmøti við luttøku av Filadelfia Vágar.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Hebron, Argir**
Leygardagin kl. 19 Nýggjársveitsla.
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti – ímeðan er barnaansing, Páll Poulsen talar um Nehemias kap. 8. Evni: »Veking við Vatnsportur«, kl. 12 Sunnudagsskúli – einki møti meðan sunnudagsskúlin er.
Heimasíða: www.hebron.fo

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Treytirnar í paktini. Kl. 11 Gudstænasta J. V. Danielsen.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa í Mariukirkjuni.
Sunnudagsskúli kl. 14.

**Samkoman Immanuel**
Í kvøld kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møtirøðin heldur áfram við evninum: Vald Jesusar sum lærari – náði og boð Jesusar Matt. 7.29.
Mikukvøldið kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Heimasíðan www.ebenezer.fo

**Samkoman Lívdin**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti har Jens Vang talar um: Brúk og forbrúk.
Sunnumorgunin í Hoyvíkar skúla, familjumøti kl. 10.30 Regin Guttesen talar um: Hvat segði Jesus um gleði? og tilbiðjanarmøti, kl. 12 Jógvan Zachariasen talar um: Boðini, 9. boð. Barnaansing er undir báðum møtunum og sunnudagsskúli er kl. 12. Millum møtini er drekkamunnur.
Týskvøldið kl. 19.30 Bøn- og bíbiltími úti á Fløtum, Zacharias Z. undirvísir um Nehemias 2/4. Heimasíða www.lívdin.fo

**Rhema á Hálsi**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti. Fríggjakvøldið kl. 18.00-19.30 ATAP (Barnaklubbur).
Sunnudagin kl. 17.00 Møti og sunnudagsskúli.

**Losjan í Havn**
*Tinghúsvegur 18*
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Glæman, Kvívík**
Missiónsvikan heldur áfram í kvøld kl. 20 har Mourits Mouritsen talar og Hansina Johannesen syngur.
Leygarkvøldið kl. 20 talar Regin Høgnesen og sangbólkur úr Leirvík syngur.

**Vestmanna missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti við Johannes Mortensen og Sólbjørn Símunarson.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 18 Evangel. møti v/ Magnus Paula Johannesen.
Mánadagin kl. 20 Bønarmøti.
18. og 19. januar eru vikuskiftismøti í avhaldshúsinum í Vík. Øll eru vælkomin.
Telefonandaktin 424741.

**Skúlin, Skálafirði**
Í kvøld kl. 20 talar Magnus Højgaard, Rituvík. Menn av Strondum syngja. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Leygarkvøldið kl. 20 talar Torleif Jóhannesen Nes, Hannis Hansen syngur.
Innsavnan til Heimamissiónina. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við Anniku Høj.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Martin Olsen. Barnamøti kl. 17.
**Alpha skeið** fyri vaksin byrjar í Kelduni í Skálafirði 21. januar. Tekning á tlf. 448755 ella www.keldan.fo
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Nerija á Skála**
Á møtinum í kvøld og annaðkvøld kl. 20 vitja Høgni Johannesen, Hallur Mortensen og Janus Gunnarson. Øll eru vælkomin.

**Thabor, Fuglafjørður**
Bønarmøti verður fríggja- og leygarkvøldið kl. 20.
Ungdómsmøtini verða framyvir leygarkvøld kl. 21. Fyrsta ungdómsmøti í hesum árinum verður leygarkvøldið.
Sunnudagin verður sunnudagsskúli kl. 14.30 og møti kl. 18.

**Lívprísningsmøti**
verður hjá Elin og Torbjørn Jacobsen í Skopun fríggjadagin kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betania, Skopun**
Leygardagin kl. 11 barnamøti frá 3 til 6 ár, kl. 14 barnamøti 1., 2. og 3. flokkur, kl. 17 barnamøti 4., 5., og 6. fl.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Sandi**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Øll eru vælkomin.

**Getsemane, Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti (filmur verður vístur).
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli og kl. 18.00 Møti.
Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við Albert og Kammu. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl. 20 Heimaforbundið.

**Dagtilhaldið í Vági**
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

**Dagtilhaldið Fløvin**
kemur saman mánadag-fríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

**BRÚKARASAMTAKIÐ**
Brúkarasamtakið er felag fyri brúkarar í Føroyum. Limagjaldið er 100 kr. árliga. Øll, einstaklingar frá 16 ár og feløg, kunnu gerast limir við at skriva til postadressuna niðanfyri, ella venda sær til ein í nevndini: Ingun Simonsen, forkvinna, 317782/ 211696, ingun@post.olivant.fo
Hans Pauli Strøm, skrivari, 424044/221919, hps@kallnet.fo
Gunnleivur Dalsgarð, kassam., 314868/311210, gunnleiv@starvsmf.fo
Høgni Debes Joensen, 311832, trongrim@post.olivant.fo
Kristina Samuelsen, 311883/211883, kris@logting.fo
Brúkarasamtakið, Postboks 165, 110 Tórshavn

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319130/61 655400.

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum**
er opin frá kl. 9.00-12.00 mánadag, mikudag og hósdag fyri foreldrum við børnum uttan ansing.

**Frá felagnum Pinkubarnadeyði**
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánað í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 6. januar*
kl. 9.45-10.15 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.15-12 Ítriv
kl. 14-18 Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan mikud. og fríggjadag tlf. 316491
*Týsdagin 7. januar*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur, Óli Vang. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 Hvussu kunnu vit á besta hátt gagna hvørjum øðrum. Ingrid Hendriksen og Bozena Rasmussen
*Mikudagin 8. januar*
kl. 10-13 Ongin matgerð Anne Grethe Harlou
kl. 15 Túrur. Sjá skránna í bløðunum
*Hósdagin 9. januar*
kl. 10-10.30 Fimleikur Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 10. januar*
kl. 10-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Heilaskaðaráðgeving**
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, BellaVista, Bellevuevej 7, 2. tv., 2930 Klampenborg, Danmark.
Tú kanst eisini ringja til: tlf. +45 39902665 (Jón) mobil: +45 24430903 (Jón)
www.neozone.dk

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld kl. 20.00-21 og 22.30-23.30.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy/Vágur**
AA-fundur verður í Vágs skúla hvønn leygardag kl. 19.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið mánadag og mikudag millum kl. 12 og 16 og týsdag kl. 16-18.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
Skrivstovan Listafólkasamband Føroya í Pætursarstovu, er opin allar gerandisdagar frá kl. 9-12. Limir eru vælkomnir inn á gólvið.
tlf: 320197
teldupostur:lisa@lisa
heimasíða: www.lisa.fo

**Amnesty International, Føroya deild**
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Skrivstovan er opin mánadag frá kl. 13.00-17.00 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost: Amnesty-Amnesty.fo

**MÁF**
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya) heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624, Faks 315924, e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

## 75 ÁR

Mánadagin 13. januar verður Eivind Petersen, Oyndarfirði 75 ár. Føðingardagurin verður hildin í kjallaranum í handlinum frá kl. 19.00.

## PRÓGV

Maiken á Argjagarði hevur 7. jan. lokið prógv sum sosialráðgevi frá Den sociale Højskole í Esbjerg.

Borgny Johannesen úr Dali gjørdist 4. okt. Cand. Theol. á Aarhus Universitet og bleiv 20. des. liðug á Pastoralseminariet í Århus.

## GULL/SILVURBRÚDLEYP

Í dag 10. januar 2003 hava hjúnini Elly og Hanni Højgaard, Rituvík og Elma og Asbjørn Mikkelsen, Skála, ávíkavist gullbrúdleyp og silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin á Runavíkar Sjómansheimi, har døgurði verður kl. 17.30 fyri teimum næstu. Aftaná kl. 21.00 er opið hús á sama stað, har øll, ið hava hug at gleðast saman við brúðarpørunum, eru hjartaliga vælkomin.

## GULLBRÚDLEYP

Leygardagin 18. januar hava Hjørdis og Finn Joensen í Sandavági gullbrúdleyp. **Vegna serligar umstøður er gullbrúdleypsveitslan avlýst.**